# Hvørt búfólk fær sína egnu íbúð

**EM-Ráðgeving, sum hevur teknað ætlaða ellis-og røktarheimið á Strondum, sigur, at hesin byggiháttur fyrst og fremst tekur atlit til brúkaran.**
**- Hugskotið er at geva brúkaranum eitt so heimligt umhvørvi sum gjørligt. Málið er eisini at seta búfólkini saman eftir, hvussu tørvurin er. Soleiðis kann skipast fyri, at ellisfarin (senildement) og sjálvhjálpin ikki búgva saman**

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*



*Øll búfólkini fáa sína egnu íbúð, sum er slakar 19 fermetrar stór, umframt atgongd til felags tilhaldsrúmið. Í íbúðini er eitt kamar, sum er slakar 12 fermetrar, umframt wc og bað, sum er stívliga 6 fermetrar. Hvør lonin hevur egnan hjall ella kova, har serføroyskur viðskeri, døgurðarestir ella annað kann goymast*

Í síðstu viku var tíðindafundur á Strondum, har Sjóvar kommuna og EM-Ráðgeving kunnaðu um ætlanina at byggja ellis-og røtarheim í bygdini.

EM-Ráðgeving í Norðragøtu, ið kommunan samstarvar við um byggiætlanir, hevur lagt fram eina verkætlan, sum fevnir um eitt ellis-og røktarheim til 54 búfólk. Projektið fevnir um 6 eins stórar lonir við plássi fyri 9 búfólkum í hvørjari lon.

Gongst, sum ætlað, verður heimið bygt á slættanum sunnanfyri Eyrugøtu á Strondum. Lonirnar eru allar settar soleiðis, at búfólkini úr felags tilhaldsrúminum hava útsýni út yvir Tangafjørð og Nólsoyarfjørð.

Atkomuvegurin verður ætlandi í framhaldi av Eyrugøtu, soleiðis at heimið kemur at liggja einar 120-150 metrar sunnan fyri syðstu húsini á Eyrugøtu. Vegurin verður 2 sporaður oman til økið, har lonirnar verða bygdar. Tá ið vegurin kemur oman, fer hann í eitt spor og gongur runt fram við teimum 6 lonunum - og í atkomuvegin aftur norðanfyri økið sum ein rundkoyring.

Fram við vegnum inni á økinum verða parkeringspláss í báðum síðum, og pláss verður fyri umleið 50 bilum.

Inni í rundkoyringini verður eitt grønt øki við beinkjum og gøtum, soleiðis at búfólkini hava møguleika at ganga sær ein túr í einum umhvørvi, sum er vart fyri veðri og vindi. Ætlanin er eisini at leggja eina gøtu uttanvert tær 6 lonirnar, og hugsandi er eisini, at ein gøta verður løgd suður á Raktanga. Ein gøta út á Raktanga verður umleið 350 metrar long. Úti á tanganum kunnu fólk njóta ríka fuglalívið, sum er har úti, tey kunnu vitja minnisvarðan yvir teir sjólátnu, og ávegis úteftir kunnu tey eisini spáka sær ein túr vesturum til Kolbeinagjógv - ella bara heim ígjøgnum bygdina á Strondum.



*Í ætlaða ellis-og røktarheiminum á Eyrugøtu á Strondum verður pláss fyri 54 búfólkum. Bygdar verða 6 eins stórar lonir, har pláss er fyri 9 búfólkum í hvørjari lon. Allar lonirnar eru bygdar í vinkul*

## Fleksibilitetur

Málið við at skipa ellis-og røktarheimið í 6 lonir við plássi til 9 búfólk í hvørjari lon, er at fáa størri fleksibilitet - og ikki minst; eitt gott nærumhvørvi. Mett verður, at málið við fleksibiliteti og kensluni av nærumhvørvi verður betur nátt á henda hátt, enn um heimið varð bygt í einari lon við plássi til 54 búfólk, soleiðis sum vit kenna røktar-og ellisheimini í dag. Tær 6 lonirnar, sum projektið hjá EM-ráðgeving byggir á, verða bundnar saman við innilokaðum gongdum, soleiðis at starvsfólk og búfólk turrskødd kunnu ganga ímillum lonirnar.

Sambært verkætlanini, kunnu búfólkini í tí einstøku lonini í Eyrugøtu setast saman - alt eftir, hvussu tað einstaka búfólkið er fyri. Á hendan hátt slepst undan at hava búfólk, ið eru ellisfarin (senildement) og búfólk, sum meira ella minni eru sjálvhjálpin, undir somu lon.

Í tí eini lonini kunnu búfólk húsast, sum eru sjálvhjálpin - og tann lonin kundi verið opin. Hesi fólkini kundu farið út í tún ella ein gongutúr í nærumhvørvinum. Í eini aðrari lon kunnu fólk búgva, sum eru ellisfarin, og tann lonin kundi verið afturlatin.

Møguleikarnir at skipa heimið eru nógvir, um bygt verður í smáum eindum. Hetta gevur eisini góðar møguleikar fyri at økja um talið av búfólkum við at byggja eina ella fleiri lonir aftrat. Byggihátturin er eisini væl egnaður, um avgjørt verður at byggja í stigum.

Tvær av teimum 6 lonunum, sum eru við í projektinum á Eyrugøtu, eru ætlaðar at hava kjallara; hinar fýra eru í einari hædd. Lonirnar við kjallara standa niðan ímóti bakkanum, og her er ætlanin at hava skrivstovu, matstovu, felagsrúm, rúm til ergo-og fysioterapi, kapell umframt rúm til húsavørð, fýrrum og annað.

## Vítt til veggja

Sambært ætlanini, verða lonirnar bygdar í vinkul, soleiðis at tilhaldsrúmið liggur í miðjuni. Við tað, at íbúðirnar liggja fyri endan og framvið tilhaldsrúminum, sleppa íbúgvarnir undan at ferðast ein langan tein fyri at koma til tilhaldsrúmið.

Hvør einstøk lon er skipað soleiðis, at hvørt búfólk hevur sína egnu íbúð umframt møguleikan at uppihalda seg í felags tilhaldsrúminum, sum er einar 66 fermetrar stórt. Her er felags matstova, køkur og dagligstova. Ætlanin er, at tey búfólk, ið eru so mikið væl fyri, skulu kunna matgera sjálvi ella saman við øðrum búfólkum og starvsfólki, um hugur er til tess.

Hvør lonin hevur egnan hjall ella kova, har serføroyskur viðskeri, døgurðarestir ella annað kann goymast.

Sjálv íbúðin er slakar 19 fermetrar; har er eitt kamar, sum er slakar 12 fermetrar og eitt wc við bað, sum er stívliga 6 fermetrar.

Møguleikar eru at seta upp hjálpitól til tey tungu búfólkini, t.d. brúsustól ella lyftu, sum er fest í loftið.

Ætlanin er, at búfólkini skulu hava møguleika fyri at taka sítt egna innbúgv við, eitt nú sofur, song, etiella sofaborð, sjónvarp og annað. Á henda hátt verða nakrar krónur spardar til innbúgv, samstundis sum búfólkini fáa eitt meira heimligt umhvørvi.

Allar inn- og úthurðar verða í minsta lagi 120 cm. breiðar, soleiðis at væl ber til at flyta innbúgv, sjúkrasengur og annað millum íbúðirnar.

## Atlit til brúkaran

EM-Ráðgeving sigur, at hesin háttur at byggja ellis- og røktarheim, tekur fyrst og fremst atlit til brúkaran.

- Hugskotið er at geva brúkaranum eitt so heimligt umhvørvi sum gjørligt. Somuleiðis er málið at seta búfólkini saman eftir, hvussu tørvurin nú einaferð er. Á hendan hátt kann skipast so fyri, at ellisfarin (senildement) og sjálvhjálpin ikki búgva saman, sigur EM-Ráðgeving.

Sambært ætlanini, fer ellis-og røktarheimið á Strondum at kosta

einar 45,5 milj. krónur; tað gevur stívliga 845.000 krónur fyri hvørt búfólk. Við í kostnaðarmetingini er tilfar og arbeiðslønir, men ikki innrættan av felagshølum, leyst innbúgv, mvg og ráðgeving.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sigrid Dalsgaard 90 ár

Leygardag 5. apríl verður Sigrid Dalsgaard í Havn 90 ár.

Sigrid í Búri er fødd og uppvaksin í Skopun. Sum ung fór hon til Íslands at tæna, og beint fyri 2. heimsbardaga fór hon somuleiðis til Danmarkar at tæna. Í 1940 giftist hon við Erling Dalsgaard á Møluni í Skálavík.

Saman fingu tey 4 synir, Kjartan, Suna, Jens Marius og Magna, og í dag eigur Sigrid 10 ommubørn og 5 langommubørn.



Føðingardagurin verður hildin í heiminum í Villumsgøtu 18 leygardagin frá kl. 16–21.

## Jógvan K. Mørkøre heiðraður

Í sambandi við at Jógvan K. Mørkøre í desember 2002 hevði arbeitt 40 ár á Loranstøðini á Eiði, hevur Hendes Majestæt Drotningin frá 2. apríl 2003 at rokna, heiðrað Jógvan við "Fortjenestemedaljen i sølv". Jógvan er frammanundan dekoreraður við "Ridder af Dannebrog" fyri sítt politiska arbeiði í Føroya Kommunufelag og við "Forsvarets Hæderstegn" fyri 25 ára trúgva tænastu.



## Svenning Reinert heiðraður

Hátíðarhald var í Mjørkadali 2. apríl. Í sambandi við at Svenning Reinert í Norðradali tann 11. mars hevði arbeitt 40 ár hjá Færøernes Kommando, hevur Hendes Majestæt Dronningen avgjørt at heiðrað hann við "Fortjenestemedaljen i sølv". Medaljan bleiv handað mikudagin 2. apríl. Sivenja er, at persónar sum fáa hesa medaljuna seinni koma á eina móttøku hjá Drottningini.



*Her fær Svenning Reinert »Fortjenestemedaljen i sølv« frá stjóranum á Færøernes Kommando, Jan T. Leisborch, kommandøri*

## Til minnis um Vilgerð Astridardóttir Hansen



Góða Vilgerð! Ein seinasta heilsan frá okkum. Tað var sera tómt at koma inn til Andreas í síðstu viku, eftir at tú vart farin, tú fylti so nógv við tínari persónligheit, tú vart tann, ið vit altíð kundu tosa við um alt, og hvar vit altíð kundu fáa okkurt lýst, ið vit kanska ikki vistu so nógv um.

Tú vart ein sum altíð spurdi til familjuna og vildu vita, hvar og hvat vit gjørdu, og ikki minst hvussu vit høvdu tað.

Tú vart nakað serligt, tað eru vit jú øll, men tú vart nú burturúr. Tá ið tú komst aftur úr Indiu, og fekk eitt gott lív her í Føroyum, koma vit meira regluliga saman, fyrst úti í Hornabø, og nú ikki minst tá ið tú hevði hitt Andreas, sum tú giftist við, eg minnis so væl, tá ið tú hevði møtt Andreas, hvussu glað tú vart, tað sást so væl á tær, at nú hevði tú funnið lukkuna, tú segði so ofta, tá vit vórðu saman, eg eri so góð við Andreas. Andreas var eisini góður við Vilgerð, ein dagin Vilgerð ynskti sær fugl at eta, og tey ongan átti, fór Andreas líka út í Svínoyarhavið at skjóta nakrar fuglar, uttan at Vilgerð vist av tí, um hon so orkaði at eta nakað av tí, veit eg ikki.

Tú og Andreas fingu bert ov stutta tíð saman, men vit mugu boyggja okkum, tá ið Gud vil hava okkum heim til sín.

Góða Vilgerð, nú ert tú saman við pápa tínum, mammu tínu og beiggja tínum »Meinert«, sum tú misti fyri júst hálvum ørðum ári síðani, bert 59 ára gamal.

Vit ynskja eisini at senda Andreas eina hjartans tøkk fyri, hvussu væl vit vórðu móttikin í heimi hansara, hvussu hugnaligt vit mangan hava havt tað saman, tá vit eru komin ein túr til Havnar, fingu mangt gott prát yvir ein drekkamunn, og ikki minst at síggja, hvussu gott tit høvdu tað saman við børnunum og abbabørnunum, tað var virkuliga fyrimyndarligt at síggja, hvussu væl tit øll komu út av tí saman, og síðan at síggja tey lítlu børnini, nú Vilgerð omma var blivin sjúk, hvussu góð tey vórðu við hana, og hon við tey, eisini svigarbørnini, virkuliga so behagilig fólk at verða saman við.

Vit ynskja, at hetta bandið, ið vit hava knýtt við familju tína Andreas, ígjøgnum Vilgerð ikki verður slitið. Góði Andreas við familju, og Manege, og tú góða Karin, einasta syskin, ið er eftir, tú passaði systir tína so væl teir sístu mánaðirnar og gjørdi tað møguligt, at hon kundi verða so leingi heima.

Vit ynskja, at Harrin má verða hjá tykkum og styrkja tykkum í komandi tungu tíð.

Æra verið minni um Vilgerð.

**Katrin við familju**

# Nýggjur skorsteinur á Sundi – friður í Kaldbak

**SEV verkið á sundi hevur fingið ein nýggjan motor og ein nýggjan skorstein, sum skuldi hildið larmin undir markið**

UMBYGGJAN
*Heri á Rógvi*



*Á Sundi verður arbeitt í 30 metra hædd fyri at rigga tann nýggja skorsteinin til. Við honum verður friðarligari í Kaldbak*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SEV verkið á Sundi verður í løtuni umvælt. Ein nýggjur skorsteinur og ein nýggjur motorur verður settur upp.

Hetta er ein íløga áljóðandi 34 milliónir fyri SEV.

Klæmint Weihe, stjóri fyri SEV, sigur, at moturin, sum verður skiftur út, er frá 1973. Vantændi verður tann nýggi moturin klárur at taka í nýtslu fyrst í mai mánað.

Samstundis verður eisini ein nýggjur skorsteinur eisini settur upp. Við nýggja skorsteininum skuldi tað verði liviligari í Kaldbak.

Fólk í Kaldbak hava síðani seinasta summar upplivað nógva gang av verkinum á Sundi, men hetta verður betri við broytingunum, lovar Klæmint Weihe.

– Við hesum liggja vit undir markninum, sum vit hava fingið álagt, sigur Klæmint Weihe.

Arbeiðið við skorsteininum verður væntandi liðugt longu hesa vikuni, men bíðast skal eitt sindur longur eftir nýggja motorinum.

## Dagurin

3. apríl. Nikaitas, deyður í 824. Abbati í Grikkalandi. Í fornkirkjuni hildu teir, at 3. apríl var dagurin, tá ið Kristus varð krossfestur.